trupulleikin kanska hevur verið mest eyðsýndur.

### Vent móti elituni

At ætlaða avtalan ongantíð varð undirskrivað, hevur so havt við sær, at innferðarloyvi ikki hava verið givin nýggjum leikarum. Hetta tí tað ikki longur eru vinnulig/arbeiðsmarknaðarlig atlit, sum tala fyri hesum, og at landsstýrismaðurin tí ikki hevur heimild at viðmæla hesum, um hann skal fylgja lóggávuni á økinum.

At tað í ávísum førum kortini hevur borið til, kemst av, at talan hevur verið um serlig viðurskifti. Eitt nú hevur B36 fingið brasilianska dos Santos til landið, men hesin er løntur frá danska Frem, sum síðani hevur leigað leikaran út til B36. Altso er leikarin her komin gjøgnum skipanina sum serkønur á sínum arbeiðsøki, sum er fótbóltur.

Tað, sum landsstýrið síðani hevur arbeitt við, er at gera eina nýggja avtalu við danska útlendingastýrið. Ein avtala, sum skal tryggja støðug viðurskifti á útlendingaøkinum hjá ítróttini. Líkamikið hvussu støðan á arbeiðsmarknaðinum er. Altso eitt ískoyti til tey undantøk, sum verandi lóggávan á økinum gevur til innferðarloyvi.

Trupulleikin er jú, at danska kunngerðin um yrkisítróttarfólk er ónýtilig í Føroyum. Bæði tí vit ikki hava yrkisítróttarfólk, og eisini tí »denne lov gælder ikki for Færøerne og Grønland«. Ístaðin hevur landsstýrismaðurin her lenað seg at nøkrum sum líkist hálvari professionalismu, og sum helst er ætla at raka inn á elituna í føroyskari ítrótt.

At tann avtalan so frá fleiri síðum verður mett at vera ov restriktiv, er so eitt annað mál. Men her stendur ítróttarheimurin í teirri støðu, at tey ikki hava onnur atlit enn síni egnu at taka, um tú skalt seta tingini heilt groft upp. Og tað er einki at ivast í, at landsstýrismaðurin her er undir sera hørðum trýsti frá samlaða arbeiðsmarknaðinum, sum í verandi støðu – har arbeiðsloysi er vaksandi – helst ikki vil hava nakra øking í arbeiðsstyrkini yvirhøvur.

Tað eru atlit, sum landsstýrismaðurin eisini er noyddur at taka, og fyri ítróttin hevur tað so havt við sær, at tað er vorðið munandi truplari at fáa innferðarloyvi til leikarar og venjarar.



*Heðin Mortensen, ÍSF-forseti, hevur serliga ført fram trupulleikarnar, sum smærru feløgini fara at koma í. Men hann noyðist helst at slúka ein ella tveir kamelar og góðtaka, at landsstýrismaðurin eisini hevur onnur og breiðari áhugamál enn tey hjá ÍSF*

# Kunning frá landsstýrismanninum

**Beint undan evstamarki okkara varð niðanfyristandi tíðindaskriv um útlendingamálið sent fjølmiðlunum**

ÚTLENDINGAMÁLIÐ
*tíðindaskriv*

Út frá tí, sum er komið fram í fjølmiðlunum seinastu vikuna um málið um tey útlendsku ítróttarfólkini, haldi eg meg kunna siga, at aktørarnir á økinum hava ikki sett seg nóg væl inn í málið - ella nýta teir ikki ta kunning, teir hava fingið. Og tá forsetin í ÍSF og onnur viðgera málið á fullkomiliga skeivum grundarlagi, so er neyðugt hjá mær at tala at.

Umboð fyri ÍSF eru væl og virðiliga kunnað um málið á tveimum fundum í Innlendismálaráðnum, bæði eg og embætisfólkini hava verið tøk hjá tíðindafólkunum og øðrum við upplýsingum, umframt at eg á heimasíðuni hjá Innlendismálaráðnum havi kunnað um útlendingamálið í síni heild. Øll, ið hava viðgjørt og úttalað seg um hetta mál, hava havt allar fortreytir fyri at tilogna sær hesa vitan.

Tað er beinleiðis skeivt, tá tað í einum tíðindablað í dag verður sagt, at Innlendismálaráðið grundgevur við, at útlendingar eru ein av orsøkunum til arbeiðsloysið í Føroyum. Innlendismálaráðið hevur ongantíð nýtt hetta sum grundgeving, og hetta er ikki at skilja málið - ella tilvitað at reingja tað á ein sera óseriøsan hátt.

Útlendsku ítróttarfólkini skapa ikki trupulleikarnar á arbeiðsmarknaðinum. Tað eru trupulleikarnir á arbeiðsmarknaðinum, sum ávirka støðuna hjá ítróttarfólkunum. Tað er ikki ein viðkomandi spurningur, hvørja ávirkan ein ella tveir útlendingar hava á arbeiðsloysið í einum ávísum øki, sum eisini hevur verið lagt upp til.

Útgangsstøðið í útlendingalógini er, at aðrir útlendingar enn norðurlendingar hava ikki loyvi at arbeiða í Føroyum, og talan skal vera um »væsentlige beskæftigelsesmæssige hensyn», áðrenn tað yvirhøvur verður umhugsað at geva hetta loyvið.

Her er tað, at støðan á arbeiðsmarknaðinum ávirkar ítróttarfólkini. Hesi vinna sær flest øll til lívsins uppihald við ófaklærdum arbeiði, meðan ítróttaryrkið bert er partvíst lønt - um tað yvirhøvur er lønt. Og tá vit stórt sæð ikki longur viðmæla, at útlendingar fáa loyvi at arbeiða sum ófaklærd í Føroyum, so kann Innlendismálaráðið heldur ikki viðmæla, at útlendingar, sum skulu íðka ítrótt framíhjá, fáa loyvi at arbeiða sum ófaklærd.

Tíðindaskrivið er undirskrivað av Jógvani við Keldu, landsstýrismanni.

# Universitetsútbúgvingar á Náttúruvísindadeildini

ÚTBÚGVING
*Tíðindaskriv*

Í summar kanst tú aftur byrja at lesa til m.a. verkfrøðing, KT-frøðing og lívfrøðing á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum. Tikið verður upp til útbúgvingarnar annað hvørt ár.

### Bachelor of Science

Útbúgvingarnar á Náttúruvísindadeildini eru BSc-útbúgvingar (Bachelor of Science). Útbúgvingarnar enda við eini verkætlan, sum tekur 14-16 vikur. Verkætlanin verður ofta løgd til rættis saman við fyritøkum og stovnum uttan fyri Fróðskaparsetrið. Eitt úrval av verkætlanum sæst á www.sleipnir.fo/setur/bs.html

### Breytir

Á Náttúruvísindadeildini eru tvær breytir: Stødd-alisfrøði breytin og lív-evnafrøði breytin. Á hvørji breyt sær eru fyrstu tvey árini eitt støðisnám, ið skal vera staðið fyri seg, áðrenn byrjað verður á triðja ári.

Á hvørji breyt sær eru flestu lærugreinirnar eins í støðisnáminum. Tað gevur í ávísan mun møguleika at broyta útbúgvingarætlan eftir lestrarbyrjan.

### Útbúgvingarnar

Tað eru skipaðar 7 BSc-útbúgvingar á Náttúruvísindadeildini. Serstøk krøv um førleikastig í stødd-, alis-, evna- og lívfrøði eru til hvørja útbúgving sær.

Tvær verkfrøðingaútbúgvingar eru, sum taka 3_ ár at lesa. Onnur í kolvetni og hin í ravmagni.

Fýra BSc-útbúgvingar eru, sum taka 3 ár at lesa. Tær eru til lívfrøðing, jarðalisfrøðing, teldufrøðing og matvørufrøðing (matvørufrøði tó ikki bjóða enn).

Nýggjasta útbúgvingin er BSc í kunningartøkni. Sum tann einasta er hon skipað sum hálvtíðarlestur, í 2_ ár. Upptøkukravið er teldustøðingaútbúgving frá td Føroya Handilsskúla ella tilsvarandi útbúgving.

Freistin fyri at søkja inn á útbúgvingarnar er 1. juli. Undantikin er upptøkan til BSc í kunningartøkni, sum fer fram eftir serligari lýsing hvørja ferð.

### Gott nærumhvørvi

Á Fróðskaparsetrinum er stutt millum lærararnar og studentarnar. Hetta er ein av stóru fyrimununum við at lesa á Fróðskaparsetrinum. Umskiftið frá miðnámsskúla til universitet verður lættari, enn um byrjað verður á einum stórum universiteti og í fremmandari mentan.

### Starvsførleikar

Bachelorútbúgvingarnar á Náttúruvísindadeildini geva góðar starvsførleikar innan fleiri vinnugreinar, millum annað fiskivinnu, frálandsvinnu, KT-vinnu, fjarskifti ella í fyrsitingarstørvum, sum krevja holla vitan innan náttúruvísindi, umhvørvi, tøkni og verkfrøði.

### Víðari útbúgving

Eftir bachelorútbúgvingina ber til at halda fram við master lestri (MSc) á útlendskum universitetum. Hetta gera tey flestu, og tey eru væl brynjað til tað, tá tey hava tikið BSc-útbúgving í Føroyum. Dømir um lond, har bachelorar hava valt at lesa víðari, eru Bretland, USA, Danmark, Noreg og Svøríki.

Eftir loknan lestur og møguligar starvsroyndir í útlondum venda tey flestu aftur til Føroya. Í BSc-útbúgvingini á Náttúruvísindadeildini hava tey fingið innlit í spennandi uppgávur, sum tey ynskja at vera við til at loysa á síni yrkisleið.

### Opið hús

Hósdagin 22. apríl er "Opið hús" á Náttúruvísindadeildini, har meir fæst at vita um útbúgvingar og um ymiskt, ið arbeitt verður við har. Henda dagin ber til at vitja millum kl 15 og 19.

### Almennir fyrilestrar

Tann 22. apríl verða tríggir almennir fyrilestrar í sambandi við "Opið hús" tiltakið. Fyrilestrarhaldarar verða Guðrið Andorsdóttir frá Føroya Fiskavirking, Sigurð í Jákupsstovu frá Føroya Jarðfrøðisavni og Jóhannes Steingrund frá Brüll & Kjær. Fyrilestrarnir byrja kl 19, og verða í Ovastovu í Nóatúni.



fk Mat - seðilin

Hósdagin 22. apríl: Kálvafrisase
Fríggjadagin 23. apríl: Hakkibúff
Leygardagin 24. apríl: Oksahárygg
Mánadagin 26. apríl: Kjøtfrikadellir
Týsdagin 27. apríl: Stoktan fisk
Mikudagin 28. apríl: Hamburgarygg
Hósdagin 29. apríl: Karbonadir
Fríggjadagin 30. apríl: Entrecote
Leygardagin 1.mai: Lambasteik
Mánadagin 3.mai: Kjøtbollar í karry
Týsdagin 4. mai: Fiskafat
Mikudagin 5.mai: Rivjasteik

***

Seinnaparts-TILBOÐ frá kl. 14.00:
Juniorburgari 22,00
Maxiburgari *ella* Búffsandwich 30,00

Matstovan í Hoyvík

Hafnia Lounge
Ronnie og Finnur spæla
Sunnudag - hósdag
Opið kl. 17.00-24.00
Servering steðgar kl. 23.30
Fríggjadag & leygardag
Opið kl. 17.00-01.00
Servering steðgar kl. 00.30
HOTEL HAFNIA
Tlf. 31 32 33
Fax 31 52 50

Í Býin

Í Býin

NÁTT-BUSSURIN
hjá Øssuri Christiansen
Koyrt verður leygarkvøld:
Vágaleiðin (tlf. 217753)
• Úr Vágunum — bert eftir avtalu
• Tórshavn - Vágar — kl. 04.30
Vestmannaleiðin (tlf. 217752)
• Vestmanna - Tórshavn — kl. 23.30
• Tórshavn - Vestmanna — kl. 00.30
• Vestmanna - Tórshavn — kl. 03.30
• Tórshavn - Vestmanna — kl. 04.30
(Koyrt verður um Kvívík og Kollafjørð eftir avtalu)
Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu
Tlf. 424254

felagið Tórshøll
Í vikuskiftinum spæla
FLÚRAR
Týsdagin 27. apríl kl.19.00
SJAVS KAPPING
Fríggjakvøld hava konufólk ókeypis atgongd til dans



Hóskvøldið
KL. 22.00 SINGER SONGWRITER VINNARIN KRISTLEIF HEVUR KONSERT Í KJALLARANUM
Fríggjakvøldið
KL. 21 - 22 DOUBLE UP
Leygarkvøldið
KL. 21 - 22 DOUBLE UP
KL. 23.00 TRIO DAM SPÆLA Í KJALLARANUM
FÓTBÓLTUR Á STÓRSKÍGGJA HVØNN LEYGARDAG OG SUNNUDAG
Restorffs YERTSHÚSIÐ
TÍ EINGIN VEIT Á MORGNI AT SIGA, HVAR HANN Á KVØLDI LIGGUR AVDOTTIN

AUTO 311234
Dag og nátt - Alt døgnið



LAT OKKUM KOYRA TEG TIL OG FRÁ
VIT KUNNU EISINI KOYRA ØRINDIR FYRI TEG
BENZIN · DIESEL · KIOSK
Talutíðarkort: Kall · Føroya Tele
AUTO TEL 311234

MÓTASHOW



FRÍGGJAKVØLDIÐ 23.04 KL. 22.00
Luttakandi handlarnir eru:
• Siri • Diva • Juniik •
• Bonnie and Clyde •
teir & tara
• Deres • Trend Floor •
ÓKEYPIS ATGONGD
atongumerkið kunnu avheintast í handlunum sum luttaka ella í Kunningarstovuni í Havn
atgongumerkini eru eisini galdandi til dansin
PLATFORM
MAERSK AIR

Manhattan PUB & CAFÉ
í vikuskriftinum
Hóskvøldið
Livandi tónleikur v/
Eyðun og Janus
Double up kl. 21.00 til 22.00
Fríggja- og leygarkvøldið
Livandi tónleikur v/
Gó Gó Blúes
Allar dagar opið frá kl. 18.00
Manhattan PUB & CAFÉ
Sverrisgøta • Tórshavn
Tel 31 96 96



BÍLEGG PIZZA
FRÍGGJANÁTT
OG
LEYGARNÁTT



HEIMKOYRING ALLA NÁTTINA
PIZZA 67
TEL. 35 67 67

club KAGGIN
Hóskvøldið
Trio Dam
Ókeypis atgongd • double up kl. 21.00-22.00
Fríggjakvøldið
Basalt
Leygarkvøldið
Basalt
www.kaggin.fo

